

# Veðrið var











**Áttanda árið á rað skipaði Bátafelagið fyri »Dans på bryggan«. Kartni Olsen, formaður í felagnum metir, at millum eitttúsund og tólvhundrað fólk vóru til tiltakið, umframt eitt stórt tal av bátum**

HUGNAKVØLD
*Leo Poulsen*
*leo@sosialurin.fo*
*Tekningar: Claus Seidel*

Tórshavnar Bátafelag hevur í februar mánaði komandi ár tíggju ára hátíðarhald, og fyri áttandu ferð skipaði felagið farna vikuskiftið fyri »Dans på bryggan«-tiltakinum.

Hetta er eitt lutfalsliga nýtt tiltak um okkara leiðir, og er meiri enn vanligt tengt at veðrinum, tí so at siga alt gongur fyri seg uttandura. Og í so máta vóru fyrireikararnir serstakliga hepnir, tí veðrið var sum kunnugt av tí allarbesta.

- Tað hepnaðist stak væl. Tað var nógv fólk, og vit gjørdu okkum ómak við at leggja bátarnar inn og út soleiðis, at fólk sluppu undan at klóra tvørtur um fleiri bátar. Eisini høvdu flestu bátarnir hesi trygdarnetini, og tað er ein stór hjálp, sigur Kartni Olsen, sum er formaður í Tórshavnar Bátafelag, sum skipar fyri tiltakinum.

Hann leggur dent á, at tað er av stórum týdningi, at bátafólkið hugsar um trygdina, tí tað er í mongu førum heilar familjur, sum koma til tiltøk av slíkum slag, kanska ikki just til dans på bryggen, men avgjørt til Ólavsøkuna.

- Hetta er ein hugnaløta fyri bæði havnafólk og avbygdafólk. Tað vísa eisini mongu bátarnir, ið koma til dansin. Vit royna eisini at hugna um við at selja búffar, og vit hava bara hoyrt, hvussu vælsmakkandi teir eru. Tað hevur øll árini verið Rasmus Magnussen, sum hevur kokkast fyri okkum, sigur Kartni Olsen.

Skal dansast, so má eisini tónleikur vera, og seinastu tvey árini hevur tað verið LM-band, ið hevur staðið fyri honum. Hvussu verður næsta ár er eingin støða tikin til enn.

- Veðrið var so avbera gott, og fólkið nógv í tali, millum túsund og tólvhundrað. Vit hava verið noyddir at seta upp ein WC-vogn, tí okkara egnu WC strekkja ikki til so nógv fólk. Men vit gera annars alt fyri at økið er reint og ruddiligt beinanvegin, tiltakið er av. So klokkan sjey sunnumorgunin var klárt hjá sópibilinum at koma framat, og tá høvdu vit ruddað ikki bara okkara egna øki, men eisini rundanum tað, sigur Kartni Olsen.

## Virkið felag

Felagið hevur sum nevnt skjótt tíggju ár á baki, og hesa tíðina hevur tað verið